# Ford Transit ársins vørubilur

**Nýggi Ford Transit er nú kosin bæði "International Van of the Year 2007" og "Årets Varebil i Danmark 2007"**

BILAR

Motorjournalisternes Klub Danmark (MKD) hava kosið Ford Transit sum "Årets Varebil i Danmark 2007". Hetta hendi mánadagin 13. november.

Í september 2006 varð Ford Transit eisini heiðraður, tá hann av eini altjóða dómsnevnd, varð kosin "International Van of the Year 2007".

Grundgevingarnar fyri at geva Transit hendan heiður vóru m.a. at bæði trygd og komfortur eru á sera høgum støði. Trygdin hjá bilførara og passaserum er sera lík tí, man sær í nýggjastu persónbilunum við t.d. airbag, ABS-bremsuskipan, ESP (standard frá 1. januar 2007), strammarar til trygdarbeltini og styrkt setur við góðum nakkestúttum.

Eisini tað at bilurin er góður at koyra, og lítið hoyrist til hjólini og motorin inni í kabinuni undir koyring, var við til at geva Transit besta karakter.

Ford kundu í fjør hátíðarhalda, at 40 ár vóru liðin síðan Ford Transit fyrstu ferð kom á marknaðin í 1965.



*Ford Transit er kosin bæði "International Van of the Year 2007" og "Årets Varebil i Danmark 2007"*

# Ford S-MAX – Car of the Year 2007



*Ford S-MAX er kosin "Car of the Year 2007"*

Tilsamans 58 motorjournalistar frá 22 ymiskum londum hava kosið Ford S-MAX til "Car of the Year 2007".

Í grundgevingum sínum fyri at Ford S-MAX fekk heiðurin sum "Car of the Year 2007", sigur formaðurin í dómsnevndin, Ray Hutton, m.a. at teir eru ovfarnir av, hvussu rúmligur bilurin er, hvussu væl hann er innrættaður og av tryggu og sportligu koyrieginleikunum. Ford S-MAX, fekk eisini fimm stjørnur í Euro NCAP trygdartestunum.

# Rover eita nú Roewe í Kina

*Rover 75 eita Roewe 750, nú teir verða gjørdi í Kina av Shanghai Automotive Industry Corporation (SAIC)*




Kinesiski bilgiganturin Shanghai Automotive Industry Corporation (SAIC) keypti herfyri ensku MG-Rover verksmiðjuna, men teir fingu ikki Rover navnið við, tí BMW hevði selt rættindini til Rover navnið til Ford.

Shanghai Automotive Industrial Corporation máttu so finna eitt annað navn. Nú eru teir komnir á kinesiska marknaðin við fyrsta við bilinum eftir keypið av MG-Rover. Talan er um "Roewe 750", sum er fyrrverandi Rover 75. Navnið Roewe úttalast "Rong Wei".

"Roewe 750" verða í fyrsta umfari bert seldir í Kina.

SAIC samstarva annars við Volkswagen og General Motors á kinesiska marknaðinum.





